# Kramnik og Adams á odda

**Nýggja Grand Slam kappingin í Sofia, er komin í helvt. Bert eitt stig er millum fremsta og aftasta telvaran**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Mtel Masters Sofia er heitið á feskastu superstórmeistarakappingini. Tað er succesvenjarin hjá Veselin Topalov seinastu mongu árini, Silvio Danailov, ið er høvuðsmaður aftan fyri tiltakið.

Teir seks superstórmeistarar sum luttaka eru: 1. Viswanathan Anand (2785) 2.Veselin Topalov (2778) 3. Vladimir Kramnik (2753) 4. Michael Adams (2737) 5. Judit Polgar (2732) 6. Ruslan Ponomariov (2695).

Garry Kasparov fekk fyrr í ár innbjóðing, men hann gavst sum kunnugt sum proffessionellur telvari í mars, og hevur nú heilagt sína orku til russiskan politikk.

## Nýggj javnleikslóg

Hóast at fyrireikarnir hava valt, at telvararnir ikki hava loyvi at bjóða remis (draw by mutual agreement), so endaðu tvey talv í fyrsta umfari kortini við javnleiki. Telvararnir kunnu bert leika javnt við at leika tríggjar ferðir somu støðu, ella telva til tað bert restar tveir kongar á borðinum. Dómarin kann eisini eftir ynski frá telvara døma talvið javnt, um talan er um til dømis ólíkalitt bispaendatalv við eins nógvum finnum í part. Telvararnir hava stutt sagt ikki loyvi at tosa við hvønn annan undir talvinum.

Alt ov ofta síggja vit stuttir javnleikir í superstórmeistarakappingum. Men tíverri hevur nýggja “javnleikslógin” ikki ført til færri javnleikir. Eftir fimm umfør er javnleiksprosentini heilt uppi á 73.

Tað er tó kortini hugaligt at fylgja við hesari kapping. Telvararnir hava sum oftast kýtt seg langt út í spennandi endatalv, men teir eru somikið javnir, at úrslitið nátúrligt sum oftast endar við javnleiki.

## Tann nýggi Kramnik

Vladimir Kramnik hevur seinastu mongu kappingarnar verið sera tamur. Sum oftast hava yvir 80% av hansara talvum endaði við javnleiki. Men í Sofia er tað í roynd og veru Kramnik, sum vísir vegin við tveimum sigrum, tveimum javnleikum og einum tapi.

Michael Adams er tryggleikin sjálvur við fýra javnleikum og einum sigri. Adams tykist á veg til sítt besta úrslit nakrantíð. Eitt tekin um tað sóu vit sunnudagin, tá hann mátti — og megnaði - leika millimetrapresis við svarta fólkinum ímóti Anand fyri at halda javnt.

Lokala hetjan, Topalov, hevur higartil skuffað við einans tveimum stigum nú komið er í helvt. Polgar hevur heldur ikki verið tætt við ein sigur og hevur eins og Topalov tvey stig.

## Støðan

| | |
|---|---|
| Kramnik | 3,0 |
| Adams | 3,0 |
| Anand | 2,5 |
| Ponomariov | 2,5 |
| Topalov | 2,0 |
| Polgar | 2,0 |

## Talvið hesa vikuna

**Ponomariov,R (2695) - Topalov,V (2778)**
Mtel Masters Sofia (5), 16.05.2005

**1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Rif3 d5 4.g3 Bb4+ 5.Bd2 Be7 6.Bg2 0-0 7.0-0 c6 8.Bf4 b6 9.Ric3 Ba6 10.cxd5 cxd5 11.Rc1 Ric6** Topalov ynskir at kompilsera støðuna og letur nú ein kvalitet fyri finnu og hampiligt spæl **12.Rixd5 Fxd5 13.Rie5 Rixd4 14.Bxd5 Rixe2+ 15.Fxe2 Bxe2 16.Bxa8 Rxa8 17.Rfe1 Bb5** Áhugaverd støða. Sjálvur haldi eg svartur hevur fingið ov lítið afturfyri sítt lítla offur, men góðir remiskjansur eiga at vera í støðuni **18.Rc2 Rid5 19.Rec1 Bc5 20.Bd2 f6 21.b4 Bf8 22.Rig4 Rd8 23.Rc8 Rd7?** Letur Ponomariov fáa kjansin at leika vakran leik. Rxc8 og síðani Kf7 sær okey út fyri svartan




**Støðumynd eftir 23...Rd7**

**24.Rih6+!! gxh6 25.Bxh6 Rf7 26.Rd8 Rie7 27.Rc7 Rig6 28.Rcc8** Hvussu sleppur svartur burturúr læstu støðuni? **28...e5 29.f4 Bd7 30.Ra8 Bh3 31.Kf2 b5 32.Rdb8 exf4 33.gxf4 Bd7 34.h4!** Ponomariov finnur vinnandi kombinatión. Topalov kann nú leggja kong **34...Bc6 35.h5 Bxa8 36.hxg6 hxg6 37.Rxa8 f5 38.Kg3 a6 39.Kh4 Rg7 40.Kg5** Frálíkt telvað av 21 ára gamla Ponomariov 1-0

# Sunnu- og mánadag í Havn

Komandi vikuskifti verða tveir dystir spældir í Havn. Tá er kappingarskipanin nevnliga soleiðis, at bæði HB og B36 hava heimadyst móti ávíkavist NSÍ og Skála.

Tað er merkisvert, at hetta er gjørt, tí samstundis er nú lagt upp til, at vikuskftið, 12. august, verður uttan nakran fótbóltsdyst í Gundadali.

Vanliga hevur tað annars verið so, at havnarfeløgini upp á skift hava átt heimavøll, soleiðis at fótbóltur hevur verið í Gundadali hvørt vikuskiftið. Sum skilst, so hava feløgini eisini roynt at býtt um, soleiðis at B36 kundi fara inn á Skála komandi vikuskifti, men heldur ikki hetta bar til.

Tí hava feløgini avrátt, at tey í vikuni fara at kasta lut um, hvør teirra skal spæla sunnudagin og hvør skal spæla mánadagin.

-jm



**TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL AUT** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** HB 140 **KM:** 65.000
**Árgangur:** 31.10.03 **Seinast sýnaður:** 31.10.03
**Viðmerking:** El-rútar aftan og framman - El-innst. spegl við aut innlegging - Regnsensor - Klimaanlegg - Radio/band/ fløguspælara - Tokulyktir - Hiti i setrum framman.
**Kr. 245.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** UN 241 **KM:** 32.000
**Árgangur:** 12.02.04 **Seinast sýnaður:** 12.02.04
**Viðmerking:** El-rútar aftan og framman - El-innst. spegl við aut innlegging - Regnsensor - Klimaanlegg - Radio/band/ fløguspælara - Tokulyktir - Hiti i setrum framman.
**Kr. 234.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,4 LINEA TERRA STW** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** SF 869 **KM:** 55.000
**Árgangur:** 18.10.01 **Seinast sýnaður:** 08.02.05
**Viðmerking:** Sentrallás - Radio/CD - El rútar/spegl
**Kr. 125.000,-**



**TOYOTA CARINA E 2,0 AUT GLI**
**Skrásetingarnr.:** F 50969 **KM:** 127.000
**Árgangur:** 01.08.94 **Seinast sýnaður:** 20.01.04
**Viðmerking:** Sentrallás - Elrútar A/F - Radio/CD
**Kr. 56.000,-**



**TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA**
**Skrásetingarnr.:** GD 102 **KM:** 76.000
**Árgangur:** 04.05.99 **Seinast sýnaður:** 18.05.04
**Kr. 72.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 D D4-D TERRA** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** GB 644 **KM:** 96.000
**Árgangur:** 20.11.01 **Seinast sýnaður:** 11.02.05
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD - klimaanlegg - Elrútar/spegl
**Kr. 163.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA 5D STW** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** RN 886 **KM:** 53.000
**Árgangur:** 03.04.02 **Seinast sýnaður:** 03.04.02
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD - Elrútar/spegl
**Kr. 140.000,-**



**HYUNDAI ATOS 1.0**
**Skrásetingarnr.:** UV 274 **KM:** 48.500
**Árgangur:** 25.10.00 **Seinast sýnaður:** 26.01.04
**Viðmerking:** Sentrallás - Elrútar - Radio/bandspælari - powerstýring
**Kr. 48.000,-**



**RENAULT MEGANE 1,6**
**Skrásetingarnr.:** LN 177 **KM:** 123.000
**Árgangur:** 16.06.96 **Seinast sýnaður:** 25.06.04
**Kr. 39.000,-**



**BMW 320 I** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** TG 558 **KM:** 233.000
**Árgangur:** 07.04.93 **Seinast sýnaður:** 11.02.05
**Kr. 55.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F